# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Nýggja Tjóðveldi




*Á tíðindafundi í morgun vórðu navn, hjartamál, búmerki og heimasíða hjá nýggja Tjóðveldinum avdúkað*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Navnið og búmerkið eru broytt, umframt at 5 nýggj hjartamál eru komin á skránna. 14. september lat Tjóðveldisflokkurin seg úr fortíðini og legði fram eyðsýndar broytingar**

POLITIKKUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

- Vit vilja á hesum søguliga degi hyggja frameftir og endurnýggja flokkin, heldur enn at fastlæsa okkum í fortíðina. Føroyskur politikkur hevur alstóran tørv á dagføring, og Tjóðveldi gongur nú náttúrliga á odda fyri at nútímansgera føroyskan politikk. Men hóast broytingar, so er frælsi og fullveldið framvegis grundarlagið undir politikki okkara, segði Høgni Hoydal, eftir framløguna í morgun.

### Nýggja navnið

Annita á Fríðriksmørk legði fram um nýggja navnið. Hon segði, at tað sjálvsagt er uppkallað eftir gamla navninum, men hetta er eitt lættari, meiri nútímansgjørt og hóskiligari navn enn tað gamla.

- Tjóðveldi fer longur enn bert at vera ein flokkur. Flokkurin setir fólk í bás, men nýggja navnið er ein hugsjón, sum øll, ið ynskja fullveldi og tjóðveldi kunnu fylkjast um. Tað er pláss fyri fleiri fólkum undir Tjóðveldinum, greiddi Annita frá.

Víðari segði hon, at tey tilvitað hava valt at hava navnið óbundið, tí tað er ein symbolikkur í sjálvum sær.

- Tá eitt orð ikki er bundið er tað meiri opið. Vit vilja vísa, at øll eru vælkomin í Tjóðveldi, og vit hava hava pláss fyri øllum fólkum.

### Nýggja búmerkið

Tjøldrini, ið so trúliga hava flogið síðu um síðu, eru nú skift út við eitt nýtt búmerki, ið tekur støði í eini vanligari føroyskari bygd, og súmbolisera vanliga føroyingin. Torbjørn Jacobsen vísti á fundinum eina mynd av Funningi, sum so líðandi varð kókað meiri og meiri saman, inntil bert sterku litirnir sóust eftir. Hareftir var so floksbókstavurin E flættaður inn í.

- Nýggja búmerkið vísir, at Tjóðveldi hevur eitt litríkt, fjølbroytt og margfalt innihald, har pláss er fyri øllum, greiddi Tobbi frá.

### 5 nýggj hjartamál

Á fundinum vóru 5 sonevnd hjartamál avdúkað. Hetta eru málini, ið flokkurin serliga ætlar at arbeiða fyri.

**Altjóða Samstarv**
Hergeir Nielsen greiddi frá um fyrsta hjartamálið. Hann segði, at vit eru noydd at dagføra okkum, so vit betri kunnu taka avbjóðingarnar í altjóðaøgerini.

- Skulu vit hava nakram møguleika at standa okkum í alheimsgerini, eru vit noydd at hava góðar útbúgvingar allan vegin, heilt frá barnaskúlanum og upp til hægru skúlarnar. Føroyskur ungdómur skal hava møguleikan at útbúgva seg í útlondunum ókeypis, eins og vit noyðast at raðfesta at fáa eitt altjóða universitet í Føroyum. Ikki fyrr enn vit hava vitanina her á landi, kunnu vit byrja at tosa um at fáa eitt kappingarført vinnulív, sló Hergeir Nielsen fast.

Hann helt áfram og segði, at vit noyðast at fáa samstarv í lag við aðrar tjóðir og felagsskapir. Og skulu vit tað, eru vit noydd at kappa bondini við verandi felagsskap, sum forðar okkum vegin til onnur samstarv.

**Samleiki**
- Tað er einki sum eitur stórar ella smáar tjóðir. Tað eru bert tjóðir. Og tað er samleikin í tjóðini, sum ger, um fólk vilja búgva har ella ikki. Eingin býr í Føroyum av praktiskum áðum, og tí kunnu vit staðfesta, at vit hava ein sterkan samleika, sum vit verða noydd at taka í álvara og røkja, segði Tobbi í síni framløgu um næsta hjartamálið.

Undir okkara samleika koma mál sum tón- og sjónleikur, myndlist, søvn, sjálvbodnir felagsskapir og ítrótt. Serligur dentur var lagdur á skúlaverkið.

**Full ábyrgd**
Full ábyrgd er eitt ofta nýtt orð, men tað er eitt hugtak, sum vit alt ov sjáldan síggja framt í verki. Vit noyðast at standa til svars og taka avleiðingarnar fyri okkara gerðir. Vit síggja ofta stórar gølur, men hvar eru avleiðingarnar, spurdi Høgni Hoydal í samband við triðja hjartamálið.

Finnur Helmsdal vísti á, at vit hava ábyrgd av at tryggja teimum veikastu í samfelagnum betri kor.

- Sum samfelagið mennist, er neyðugt, at vit fáa lóggávuna at fylgja við. Vit hava eina forsorgarlóg sum fyllir 50 ár fyrsta dagin, og sum hevur stóran tørv á ábótum. Vit mugu kunnu klára at taka ábyrgdina av okkara ungu brekaðu og sálarsjúku, ístain fyri bert at senda tey av landinum, legði Finnur dent á.

**Ríkt umhvørvi**
Heidi Petersen hevði stutta framløgu um umhvørvispolitikkin hjá Tjóðveldinum. Hon segði, at umhvørvispolitikkurin leingi hevur verið forsømdur í Føroyum, og at altjóða avtalur sum Agenda 21 og Kyoto framvegis ikki eru galdandi í Føroyum.

- Vit noyðast at kortleggja og varðveita náttúruna, og at nýta vind- sól og alduorku. Men umhvørvi røkkur eisini longri, t.d. skal arvbeiðsumhvørvið bøtast, soleiðis, at til ber at liva eitt gott arbeiðs- og familjulív. Skúlaumhvørvið skal eisini bøtast við betri innbúgvi og hølum, umframt heilsugóðum kosti, greiddi Heidi frá.

Hon vísti eisini á góðu møguleikar okkara at granska í umhvørvinum.

**Veruligt frælsi**
Høgni Hoydal legði sjálvur fram seinasta hjartamálið, sum er veruligt frælsi. Hann greiddi frá, at tað ikki nyttar nakað, at vilja hava frælsi úteftir, um frælsi ikki er inneftir. Her sipaði hann serliga til, at tað skal vera persónligt frælsi til at liva eftir egnum sannføringum og við egnari trúgv.

- Kvinnufrælsi er eisini sett á dagskránna, m.a. mugu vit kanna hvussu stendur til við lønarlagi, starvsstatusum og leiðarapostum í samfelagnum. Tjóðveldið fer at gera sín part, við at hava helvt um helvt av kvinnum á listunum, og at kynsbýta álitispostarnar í flokkinm, slóð Høgni Hoydal at enda fast.

## Nýggj heimasíða

Ein av mest kollveltandi avdúkingunum hjá Tjóðveldinum í morgun var tó nýggja heimasíðan, sum eitur www.tjodveldi.fo.

Á hesi síðuni ber til hjá veljaranum at koma í samband við sítt umboð umvegis mail, blogg ella sonevndar "youtube"-kykmyndir.

-Vit vilja hava samband við veljaran. Tað gongur ikki í 2007 bert at seta ein kross 4. hvørt ár, og so ikki hava nakra ávirkan á politisku avgerðirnar næstu fýra árini. Tí hava vit valt at gera hesa heimasíðuna, her lætt er at kjakast, koma við persónligum hjartamálum og geva okkum politikarum viðmerkingar, segði Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum.

Hann heldur, at hetta samstundis er ein upplagdur møguleiki at náa ungdóminum, sum við hesum møguleikunum framyvir ikki bert verða áskoðarar, men kann gerast aktivur í flokskjakinum og harvið fáa onnur mál á dagskránna.

## Heidi Petersen



*Hvørja ávirkan fer broytingin at hava á veljaran?*

- Eg vóni, at vit við hesi broytingini hava latið flokkin meira upp fyri fólkinum. Boðskapurin er jú, at Tjóðveldi er fyri øll, sum ynskja eina frælsa tjóð. Tí vóni og vænti eg eisini, at undirtøkan fer at verða góð. Og við heimasíðuni lata vit jú eisini enn meiri upp fyri almenninginum.

*Hvønn týdning fer heimasíðan at hava?*

- Hon fer heilt víst at hava stóran týdning. Tað verður jú nógv lættari at koma í samband við veljaran á henda hátt. Tað er kanska ikki so lætt hjá øllum at ringja ella koma á vitjan, fyri at siga okkum sína hugsan. Tá er tað er jú nógv lættari at skriva nakrar reglur á bloggin. Hetta fer at lætta munandi um samskiftið, og eg gleði meg at fara í gongd.

## Hergeir Nielsen

*Er ikki vandi fyri, at tit sum flokkur missa ein part av samleikanum, nú tit hava gjørt so umfatandi broytingar?*

- Tað var mín fyrsta hugsan, ja. Men nú, tá man hevur vant seg við navnið og búmerkið, haldi eg skiftið vera gott. Tað er meiri rúmd í hesum navninum. Tjóðveldisflokkurin er bara tað, sum stillar upp til val. Tjóðveldi fevnir nógv longri og hevur eina meiri savnandi ávirkan.

*Nú skulu tit eisini svara spurningum á heimasíðuni. Fer hetta ikki at vera steinum oman á arbeiðsbyrðuna?*

- Heimasíðan verður eitt sera spennandi arbeiði. Eg havi havt heimasíðu í fleiri ár, so fyri mær er hetta ikki so nýtt. Tað er gott at fáa reaktiónir og at kunna svara aftur. Tey, ið eru upptikin av politikki sleppa at geva sína meining og at set aspurningar. Hetta fer heilt víst at hjálpa okkum politikarum at stinga fingurin í jørðina av og á, og hugsa um hvat tað er, vit gera. Fólk kunnu eisini koma við hugskotum, sum vit so kunnu hugsa víðari um. Hetta fer at hjálpa okkum at taka støðu alla tíðina.

